# Tinghella

# C-mál

**Kári á Rógvi hugleiðir hesuferð um royndirnar at fáa semju í lag um tey málini, sum ikki eru nevnd í heimastýrislógini**

TINGHELLAN
*Kári á Rógvi*



Nú fættist, at føroyingar og danir kunnu semjast um tey málsøki, ið hvørki eru á lista A ella lista B sambært heimastýrisskipanina. Fæst ein tílík semja er tað stórt framstig fyri Føroyar - serliga um semja eisini verður innanhýsis í Føroyum.

### Hvat snýr tað seg um?

Í 1948, tá heimastýrisskipanin var smíðað, royndu tey sum frægast at reksa upp málsøkini. Summi vórðu sett á lista A - hesi kundu føroyingar taka yvir eftir vild. Onnur fóru á lista B - hesi kundu føroyingar taka yvir eftir samráðingar við danskar myndugleikar. Tey yvirtiknu málini nevndu tey sermál; tey ikki yvirtiknu felagsmál. Samstundis var tað møguligt hjá báðum pørtum at umsita mál vegna hin partin.

Eftir vóru nøkur málsøki, fyri ein part slík, sum føroyingar ikki høvdu stórvegis áhuga fyri, og so tey, sum danskir myndugleikar hildu gingu danska ríkinum ov nær. Harafturat eru málsøki, sum ongin hugsaði um ella ikki vóru uppfunnin fyri hálvari øld síðani.

Hesi málsøki hevur onkur skilamaður nevnt C-mál. Tey eru sostatt tey felagsmál, sum ikki eru nevnd á teimum báðum heimastýrislistunum.

Fyri tað nógva eru hetta mál, sum hoyra til tað, ið á eingilskum verður nevnt 'lawyer's law' - sakførara-mál - harímillum rættarskipan, revsing, keyp, avtalur, skyldur, arvur og familjumál. Síðani eru eisini tilbúgving, mál og vekt, og útlendingamál.

### Denne lov gælder for Færøerne

Tað er onki forgjørt í tí, at eitt sjálvstýrandi land í samveldi hevur egna rættarskipan og egnar reglur um revsing ella familjumál. Hyggja vit at grannanum sunnanfyri, Skotlandi, síggja vit, at teir hava egna rættarskipan. Hesa hava teir havt síðani teir løgdu saman við Englandi í samveldið Stóra Bretland fyrst í 1700-árunum. Sjálvt um skotar ikki høvdu egið ting í tvær øldir, so samtykti samveldistingið lógir fyri serligu rættarskipanina í Skotlandi, eins og fyri mong onnur málsøki við serligari skotskari skipan. Hesar tinglógir hava "Scotland" skoytt uppí lógarnavnið í parantes.

Ein líknandi skipan hevur verið galdandi í Føroyum. Men tíverri ikki eins væl skipað. Á summum økjum hava danir frá gamlari tíð viðurkent føroyskar serskipanir. Eitt nú hava vit eina "Lov for Færøerne om Hauges Styrelse og Drift m.m." frá 1937. Hetta er ein donsk tinglóg, sum bert hevur gildi í Føroyum, samtykt í samsvari við tilmæli úr Føroyum. Sambært hesi lóg ganga "Haugerøgtere" og hyggja til síni "Faar" í føroysku høgunum.

Fyri rættargangin er onnur skipan. Vit hava ein "Lov om rettens pleje" galdandi í Føroyum. Hetta er eisini ein donsk tinglóg, men hon er sett í gildi við kongaligari fyriskipan við ávíum broytingum. Partvíst broytingum, sum føroyingar hava ynskt, partvís broytingum, sum føroyingar ongantíð hava tikið støðu til.

### Høvdu teir hagreitt tey betur

Hagalógin er dømi um eina lóg, sum føroyingar hava ábyrgdina av, men onki hava gjørt við. Hóast reglur ikki samsvara væl við veruleikan, eitt nú viðvíkjandi vetrarfriðing, eigaraviðurskifti í samband við matrikulin, fyri ikki at tosa um hagastevnur og stýri, so hava føroyingar ikki tikið seg saman enn at endurskoða hagalógina. Hóast sundsbóndin fyri langari tíð síðani mælti: "ikki danskt á fjalli", so er hagalógin enn donsk - hóast vit hava havt málsræði á høgunum í mong harans ár.



*Nú fættist, at føroyingar og danir kunnu semjast um tey málsøki, ið hvørki eru á lista A ella lista B sambært heimastýrisskipanina. Fæst ein tílík semja er tað stórt framstig fyri Føroyar - serliga um semja eisini verður innanhýsis í Føroyum. Kári á Rógvi hugleiðir um royndirnar at fáa semju um tey málini, sum ikki eru nevnd í heimastýrislógini*

Skaðin er tó nógv størri á øðrum økjum. Brúkaravernd er farin afturvið borðinum og afturúrsigld í Føroyum. Lógin hjá okkum um tryggingaravtalur, til dømis, er ikki bara á donskum, hon er frá tíðini, tá navnorð vórðu stavað við stórum stavum.

Hóast útvarpið tosar um stuldur og blygdunarskemd, so er tað also tyveri og blufærdighedskrænkelse, sum verða revsaði.

Høvdu føroyingar ynskt betri reglur og betri skipanir í C-málum, so kundi tingið havt samtykt ríkislógartilmæli til serligar føroyskar lógir. Tað hevði verið munandi beteri við eini 'Lov for Færøerne om rettens pleje' enn sum í dag við einari kongaligari fyriskipan, ið setur sum í og sum úr gildi av donsku lógini um rættarskipan.

Samanumtikið standa hesi C-mál í óføri í gjónni millum landið og ríkið.

### Eitt, tvey, trý yvirtaka vit

Nú fættist, at andstøðan á tingi er til reiðar at taka undir við eini nýggjari skipan fyri C-málini. Tað er at frøðast um, ikki minst tí ein breið semjar er fortreytin fyri at fáa málini upp úr aftur tí óførinum, har tey í dag standa upp undir hendur í runu.

Vit sleppa tó ikki undan at taka støðu til spurningin um støðu okkara í samveldi við Danmark. Talan er um at broyta markið ímillum land og ríki, so hesar røkurnar koma undir føroyskt vald. Men er nú talan um nøkur frælsi, sum vit fáa frá ríkinum, og sum vit kunnu missa aftur? Ella er talan um eina marknaumskipan millum javnar partar, og sum ikki kann takast aftur?

Seinast løgtingið megnaði at semjast um tey ríkisrættarligu viðurskiftini var í 1947, tá løgtingið í semju samtykti at fara undir samráðingar við danska ríkið. Støðan var tá greið. Tingið vildi undir samráðingar, har vit vóru annar parturin, og danir hin.

Tíverri hava danskt útbúnir juristar, bæði føroyingar og danir, vilja gørt heimastýrisskipanina til ein spurningin um jura heldur enn politikk, og tíverri vóru føroyingar ikki samdir um skipanina innanhýsis. Hóast løgtingið valdið at ganga undir eina lóg heldur enn ein sáttmála, so stendur eftir, at heimastýrisskipanin varð samtykt fyrst á Føroya Løgtingi og síðani á Ríkistingi. Talan var um eina serliga lóg samtykta á tveimum málum av tveimum tingum við serligum fororði og við støði í eini politiskari semju millum landið og ríkið.

Tingmenn eiga í øllum førum at ansa eftir, at vit ikki víkja frá hesum. Í fyrstu atløgu skal nýggja skipanin við C-málunum byggja á eina politiska semju millum lands- og ríkismyndugleikar. Síðani má hvør parturin í samsvar við sína egnu skipan staðfesta hesa avtaluna. Stýrisskipanarlógin ásetir, at yvirtøkur á føroyskari síðu skulu samtykkjast við lóg. Sjálv semjan um, at C-málini kunnu yvirtakast, eigur at verða gjørd eins sáttmálakend og sjálv heimastýrisskipanin. Avgerðin um, at tey skulu yvirtakast, kann síðani verða tikin eftir innlendis mannagongd.

Bert at samtykkja eina fólkatingslóg kann vera ein vandi fyri fatanina av verandi støðu. Føroyingar mugu halda fast um, at talan er um eina sáttmálastøðu, ikki eina delegatión ella tillutan av rættindum.

### Fýra, fimm, seks og so slaka vit

Tað, sum øll tykjast taka undir við, er at hesi málini kunnu yvirtakast. Summir samgongulimir vilja helst staðfesta, at øll C-málini skulu yvirtakast beinanvegin. Tað kann beina fyri semjuni. Tað frægasta er tí helst at steðga við at gjøgnumføra yvirtøkurnar til vit hava kjakast eitt sindur um tað innihaldsliga í teimum. Tá vit vita, hvussu nógv C-málini kosta, fer helst eisini onkur strongur at koma í finansin.

Á rættar- og revsiøkinum hevur landstýrið tikið undir við at yvirtaka Føroya rætt og landsrætt í fyrsta umfari, og í høvuðsheitum at varðveita verandi rættarskipan eisini eftir yvirtøkuna, samstundis sum hægstirættur verður verandi felags.

Eg havi á fleiri øðrum støðum víst á, at sera umráðandi er at taka støðu til rættarskipanina. Ikki minst mugu vit taka støðu til, hvussu dómarar skulu veljast. Eg kann bara minna á 'Jørgen-málið'. Nógv lógkøn fólk eru, men háttalag og fatan eru so ymisk. Tí mugu vit taka støðu til, hvussu vit velja teir dómarar, sum skulu sita í einum føroyskum løgrætti (landsrætti). Tað verður stór skomm, um vit manna ein evstan føroyskan dómstól við ókunnumonnum.

### Samveldi

Fáa vit hesa semju uppá pláss nærkast vit alt meiri skipan, har tað úteftir sýnist, at tað eru Føroyar, sum eftir egnum vilja hava knýtt seg at Danmark í eini samveldisskipan, so leingi føroyingar sjálvir ynskja tað.

Eftir hjá samveldinum liggja bert tey mál - sum vit passandi kunnu nevna D-málini - sum illa kunnu liggja aðrastaðni enn hjá samveldinum. Hetta minnir nógv um líknandi samveldisskipanir, eitt nú hjá okkara tjóðskaparliga systkinabarni Mann, og hjá oyggjalondunum í kongaríkinum Niðurlondum (Hollandi), Aruba og Niðurlendsku Antillunum.

Eftir verður bara at skipa A, B og C-málini sum væl, sum til ber...

...til D-dagurin kanska einaferð upprennur.



## NØVN Í VIKUNI

# Oddfríður Gregersen 75 ár



1. februar fylti Oddfríður Gregersen í Syðrugøtu 75 ár. Oddfríður er føddur og uppvaksin í Syðrugøtu. Hann var tann fyrsti sum bleiv doyptur á føroyskum í Gøtu kirkju. Oddfríður hevur verið ein aktivur maður á mongum økjum. Hann var stjóri á P/F Fiskavirkinum í Gøtu, frá tí hann var 36 ára gamal, til hann legði frá sær sum 70 ára gamal. Hann var formaður í Gøtu kommunu í 14 ár, frá 1970-1984. Hann sat í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag í 25 ár, harav 9 ár sum formaður. Eisini var hann reiðari á nótabátinum Saturn og á skittfiskabátinum Sporinum. Nú hava synirnir, Atli, Páll og Regin yvirtikið dagligu leiðsluna av teimum ymisku feløgunum, sum Oddfríður rak.

# Politikari verður nú eisini headhuntari

**Jógvan við Keldu er stjóri í felagnum SAM International Føroyar, sum nú fer at átaka sær at finna røttu fólkin til røttu størvini**

HEADHUNTER
*Eyðun Klakstein*



*Jógvan við Keldu skal byggja deildina hjá SAM International í Føroyum upp. Felagið hevur til uppgávu at finna røttu persónarnar til leiðarastørv og onnur størv í føroyskum fyritøkum*

Løgtingsmaðurin Jógvan við Keldu skal standa á odda fyri arbeiðnum hjá SAM International í Føroyum.

Danska felagið, sum hevur havt stóran vøkstur í sínum virksemi, síðani tað varð stovnað fyri 9 árum síðani, kemur nú eisini til Føroya.

– Virksemið hjá føroysku deildini skal byggjast spakuliga upp. Tað ræður um at arbeiða á rættan hátt, so álitisviðurskifti kunnu byggjast upp millum fyritøkur og einstaklingar, sigur Jógvan við Keldu.

– Eitt sindur av headhunting hevur verið brúkt í Føroyum, men tað kundi verið brúkt í nógv størri mun, tí í Føroyum er eisini umráðandi at finna best egnaða persónin til tey ymsu størvini.

### Finna rætta persónin

SAM International headhuntar fólk til størv av ymsum slagi. Uppgávan hjá felagnum er at finna tann rætta persónin til tað rætta starvið.

– Tað kann kosta eini fyritøku nógv, um rætti persónur ikki verður funnin til eitt starv í fyrstu royndini. Her kann SAM International koma upp í leikin við sínari servitan á økinum, sigur Jógvan við Keldu.

Vanligt er, at SAM finnur fólk til leiðarastørv í fyritøkum, men felagið átekur sær eisini at finna røttu fólkini til onnur størv. SAM hevur eisini ein dátubasa, har fólk kunnu skráseta seg, um tey hava hug at finna sær nýtt starv.

### Stórur vøkstur

SAM International er ein donsk fyritøka, sum hevur fingið sær deildir í fleiri londum. Tey eru at finna í Svøríki, Noregi, Finlandi, Týsklandi, Sveis og nú eisini í Føroyum. Tað hevur gingið strúkandi hjá felagnum, síðani Niels Schreiner Andersen gjørdi álvara av hugskotinum í 1993. Felagið er ein sonevnd Gazelle-fyritøka og hevur havt ein vøkstur upp á 60 prosent, síðani tað fór at virka. Nú er tað helst størsta headhunrarafelag í Danmark.

27 headhuntarar eru í danska felagnum. Tað eru fólk við nógvum og ymiskum royndum, og nógv av fólkunum koma frá leiðarastørvum í stórum donskum fyritøkum. Tey hava tí nógv sambond at dúva uppá, og tað er neyðugt í slíkum arbeiði at hava gott netverk.

Hósdagin kemur stjórin í felagnum til Føroya »at klippa snórin«, so føroyska deildin kann fara undir sítt virksemi. Niels Schreiner Andersen skal vitja ymsar fyritøkur, meðan hann er í Føroyum.

# Bjarki Mohr er formaður

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag hevði aðalfund mikukvøldið. Nýggja nevndin hevur skipað seg við Bjarka Mohr sum formanni**

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv*



*Bjarki Mohr er nýggjur formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag*

Á aðalfundi hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag seinasta mikukvøld var m.a. nevndarval á skránni. Í nýggju nevndina vórðu vald:
Jón Johansen
Katrin Gaard
Bergur Dam
Sum tiltakslimir vórðu vald:
Elsba Olsen
Joan Ziskason

Nýggja nevndin í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skipaði seg á nevndarfundi 17. februar soleiðis:
Bjarki Mohr, formaður
Katrin Gaard, næstformaður
Jón Johansen, kassameistari
Bergur Dam, skrivari
Bente Kjær, nevndarlimur

# Georg Thorsteinsson

**f. 19. februar 1926 d.12. februar 2003**



Mikudagin, 12. februar, andaðist Georg Thorsteinsson í Havn, 76 ára gamal, eina viku áðrenn hann hevði fylt 77. Georg Johan Frits Thor-steinsson, var føddur 19. februar 1926 í Trongisvági.

Foreldur hansara vóru Peter Carl Thorsteinsson, vanliga nevndur Carl á Brúgv (1888-1957) í Trongisvági, og Anna Christina Hammer (1901-1933) av Sevmýru á Tvøroyri.

Georg var triði elstur av 5 systkjum og var bert 7 ára gamal tá mamman doyði.

Elst av systkjunum er Mary, giftist Børga Persson, næstelst er Esther, giftist Tóra Zachariassen, fjórðelst er Clara, giftist John Borgarlíð og seinni við Agnari Nielsen. Yngsti bróðurin er John, sum giftist og búsettist í Herning.

Pápin Carl á Brúgv giftist seinni uppaftur við systrini hjá Annu, Elin O. Fr. Hammer. Saman fingu tey trý børn: Arna, Marionnu og Margrethu.

Georg var sum ungur í kolanáminum í Rangábotni í Trongisvági og seinni í handlinum hjá N.J. Mortensen á Tvøroyri. Tá hann í 1949 flutti til Havnar, arbeiddi hann hjá ymsum fyritøkum í Havn. Hann arbeiddi í heilsøluni hjá Niels Johannesen, síðani hjá Bendtsen, til hann í 1952 arbeiddi fyri Grønlandsfelagið og var hann tvær reisur í Føringahavnini á sumri og arbeiddi í handlinum har. Eftir tað arbeiddi hann hjá Farodane og seinni aftur hjá Einar Storr, til hann í 1958 byrjaði fyri seg sjálvan við heilsølu, har hann seldi nógv ymist. Tó er hann mest kendur fyri at selja tógv. Hetta førdi m.a. við sær at kona hansara, Marita, byrjaði at reka tógvhandilin Igloo.

Georg giftist í Sands kirkju tann 11. juli 1948 við Maritu Hentze Viderø, ið var dóttir Christian Michael Viderø (1894-1975) uppi í Stovu, í Trøðum á Sandi og Johannu Karolinu Hentze (1897-1987) úr Uttarustovu á Sandi. Tey fingu 6 børn. Hans Arni f. 1949, Kári f. 1951, Bergur f. 1953 d.1987, Heri f. 1955, Randi f.1958 og Thordur f. 1959.

Georg hevði stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum sum heild. Hann var limur í barnaverndarnevndini í Havn frá miðskeiðis í 70-unum og sat í heili 22 ár í nevndini, harav 20 ár sum formaður.

Georg var íðin ættargranskari og hevur lagt nógva orku í hetta ítriv, sum fylti so stóran part av hansara lívið tey nógvu seinnu árini. Tað er ikki smávegis skrivligt tilfar, sum liggur eftir hann. Alt er hondskrivað.

Friður veri við minninum um Georg Thorsteinsson.